# Sum ein nýggj tyrla

**FAKTA**

**Tyrlan**

**Slag:** BELL Helicopter Textron BELL 212
**Byggiár:** 1974
**Størsta longd:** 17,4 m
**Breidd:** 2,5 m
**Hædd:** 4,45 m
**Høvuðsrotor diametur:** 14,63 m
**Vekt (tóm):** 3.552 kg.
**Vekt (fullfermd):** 5.080 kg.
**Lyftimegi (sling):** 850 kg
**Max. ferð:** 222 km/t
**Vanlig ferð:** 185 km/t
**Tal av ferðandi:** 10 (13)

**Tað er lítið gott eftir av tyrluni her hon stendur í stóra hangarinum hjá Atlantsflogi. Eldra tyrlan er í løtuni til høvuðseftirlit. Tað er ikki so lítið, sum skal gerast í hesum sambandi, men so fáa vit eisini at kalla eina nýggja 32 ára gamla tyrlu!**

TYRLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Flogvøllurin:** Hon minnir rættiliga lítið um eina tyrlu í heila tyki: Halin stendur í einum staði og kabinan í einum øðrum, – alt skrellað fyri bæði motorar, innihald og rotorbløð.

Inni í kabinuni eru tveir mans í ferð við at passa annan forrútin til. Hetta gongur ikki í fyrstu atløgu, men løtu seinni eru teir nøgdir við úrslitið. Teir fara nú eftir hinum rútinum.

Teimum við lið stendur ein maður íðin og arbeiðir við eini plátu. Hon skal fílast til, tí hon skal skiftast út og síðani festast á tyrluna, áðrenn hon sleppur á flog aftur.

Atanfyri hann stendur ein annar maður og arbeiðir við sjálvum rotorinum á tyrluni. Hann er tikin úr tyrluni og stendur nú á gólvinum, har hann verður eftirhugdur og allar defektir lutir verða skiftir út.

Millum hesar menn gongur ein annar maður við eini bók í hondini. Hann steðgar á, spyr teir onkran spurning og skrivar upp í bókina, áðrenn hann fer víðari til tann næsta mannin.

Hetta er flogteknikkarin, Jens Eystein í Løði. Hann er maðurin sum hevur dagliga leiðsluna av hesum arbeiðinum.

Og tað er ikki so lítið, hann skal halda skil á. Sambært áðurnevndu bókini eru einar 125 ymiskar uppgávur, ið hoyra til hetta eftirlitið. Men sum skilst koma altíð aðrar uppgávur fram undir slíkum arbeiði.

– Jú, hetta er eitt stórt, men kortini sera spennandi arbeiði, sigur Jens Eystein.

Teir báðir menninir við vindeygað rópa á hann. Hann fer yvir til teirra, og løtu seinni verður henda

HANDILIN

## Spennandi sølustarv í LM Handlinum

Søkt verður eftir einum sølufólki, ið hevur áhuga, hugflog og áræði at vera við til at menna LM Handilin.

**Vit kunnu bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv innan handilsyrkið. Vit hava um 50 fólk í starvi, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum. Tú ført gott innlit í nógv viðurskifti, so sum sølu, innkeyp og marknaðarføring. Starvið inniber nakað av ferðavirksemi til sølustevnur og til samstarvsfelagar uttanlanda.

Vit kunnu eisini bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Høvuðsuppgávur**
- Samskifti við viðskiftafólk og veitarar.
- Søla av hvítvørum og radio/sjónvarpsútgerð.
- Marknaðarføring.
- Innkeyp.

**Krøv til umsøkjara**
Tú mást hava áhuga fyri økinum, og best hevði verið, um tú hevur royndir frá líknandi arbeiði. Tað er ein fyrimunur um tú:
- ert fyrikomandi og kundavinaligur.
- kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- hevur góð samstarvsevni.
- kanst loysa fleiri uppgávur samstundis.
- ert arbeiðssamur, røkin, fyrikomandi og hugagóður.

Vit leggja dent á, at tú hevur áræði og vilja til at gera mun, til gleði fyri teg sjálvan, starvsfelagar og fyritøkuna.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Kenneth Samuelsen (ks@lm.fo) ella Leiv Holm (lh@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera Pf. Leif Mohr, postboks 3100, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2006.

p/f Leif Mohr Hoyviksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 e-mail: lm@lm.fo www.lm.fo

TEAM85




Lærlingur

*Til handil okkara 2x3 í Tórshavn, sóknast vit eftir einum dugnaligum lærlingi.*

**Starvið**
inniber, at tú sum frálíður ført ábyrgd av ávísum økjum og skalt fyrst og fremst virka innan sølu og tænastu mótvegis kundum okkara.
Samstundis verður innkeyp og samskifti við veitarar av vørum til handilin sum frálíður ein náttúrligur partur av arbeiðisdegnum.

**Lærutíðin**
er 3 ár um umsøkjarin hevur lokið FHS-útbúgving og 2 ár um HH-útbúgving er lokin.

**Vit vænta**
at tú ert málsøkin, setur kundatænastu í fremstu røð og hevur evni og viljan at verða ein virkin luttakari ímillum nakrar sera dugnaligar starvsfelagar.

**Tú fært**
eitt spennandi læruplass har tú kanst menna tíni evni innan handil og sølu á einum stórum og sera virknum arbeiðisplássi.
Løn- og setanartreytir verða sambært avtalu.

**Umsóknarfreistin**
er mánadagin 27. mars 2006, og skulu umsóknirnar sendast:

**Timburhandilin**
Heykavegur 4
Box 3038
100 Tórshavn
Att.: Jørmann Petersen

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN